gult cyan magenta svart



# Favoritturin fall tíðliga

**Úrslit frá kapping, sum var um vikuskifti í neytstinum hjá Havnar Róðrarfelag**

DART
*tíðindaskriv*

Dartsambandið skipaði um vikuskifti fyri sættu einstaklingakappingini hetta kappingarárið. Higartil hevur talið av luttakarum ikki verið nakað at reypa av, men leygardagin var vent í holuni, 30 mans teknaðu seg til kappingina í einmansleiki og tað er tað mesta í fleiri ár. Fleiri nýggj andlit vóru at síggja, men eisini nakrir unglingar frá 90'unum høvdu tikið pílarnar av aftur hillini.

Ovasti leikarin á styrkilistanum, Henrik Pedersen, tapti í fjórðingsfinaluni; men burtursæð frá honum hevði restin av hægst styrkismettu leikarunum spælt seg í hálvfinalurnar. Í aðrari hálvfinaluni hittust Remy G. Hansen og Alvin Egholm. Remy vísti betra spælið og vann eisini 5-3.

Í hinari hálvfinaluni hittust Petur Grønagarð og Poul Poulsen. Petur spældi betur og betur sum dagurin leið og í hesum dystinum vísti hann rættuligt stórspæl. Petur vant rættuliga burtur úr Poul og vann uttan trupulleikar 5-0 og brúkti í hálvfinaluni ongantíð meir enn 18 pílar til eitt sett.

### Finalurnar

Finalan gjørdist ikki tann vælleikti dysturin ein kundi rokna við. Petur vann uttan stórvegis trupulleikar 6-2.

Eisini í tvímansleiki vóru nógvir luttakarar; men tá komið var fram til hálvfinalurnar var tað sum tað plagar.

Henrik Pedersen/Poul Poulsen taptu bert eitt sett í teimum 12 dystunum á veg í hálvfinaluna. Í hálvfinaluni vunnu teir 5-2 á Jan Midjord/Jackie Joensen. Í hinari hálvfinaluni spældu Páll Dam/Remy G. Hansen móti Alvin Egholm /Suna Rasmussen. Hetta gjørdist ein sera spennandi dystur. Nógvir nervar gjørdu, at báðir partar høvdu trupult við at "lukka" settini. Hetta gjørdi samstundis, at flestu settini kundu farið báðar vegir. Øll 9 settini skuldi eisini til fyri at avgera dystin. Páll & Remy drógu longra stráið og vunnu 5-4.

Í finaluni komu Henrik & Poul skjótt upp á 4-1. Spenningur kom tó aftur í dystin, tá Páll & Remy megnaðu at minka um munin til 4-3. Endin var tó, at Henrik & Poul vunnu 6-4. Tað sær ikki út til, at nakar í løtuni megnar at syfta teir af ovastu rók í tvímanleiki.

Allir vinnararnir fingu steyp og heiðursmerkir frá Føroya Banka og vunnu sær samstundis týdningarmikil stig til styrkilistan, sum er at síggja á tekstvarpssíðu 230.



*Allir vinnararnir fingu steyp og heiðursmerki frá Føroya Banka*

Kyndil–VB 30–40 (13-15)

# Málveitsla á Hálsi

*Serliga var tað Andrea Lütz, sum voldi kyndilsverjuni trupulleikar, og í pørtum av dystinum varð hon mansvard*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**VB vann ein tryggan sigur á Kyndli leygardagin, men leingi helt Kyndil væl fatur í mótstøðuni, áðrenn talan at enda varð um sanna málveitslu**

Ikki kann sigast annað enn, at avrikini hjá Kyndli hava verið sera misjøvnn seinastu vikurnar.

Eitt flott avriki í Klaksvík, har tær nærum koppaði føroyameistarunum úr Stjørnuni, varð fylgt upp av einum sera skuffandi avrikið, tá Tjaldur fekk sítt næsta stig í hálvt annað ár, og leygardagin stóu tær so fyri eini sera torførari uppgávu, tá VB kom á vitjan.

Kvinnurnar úr Vági hava kappingarárið á tamb talst millum bestu liðini í deildini, og hóast tær nú hava fingið enn ein skaða at dragast við, var uttan iva væntandi, at tær fingu stigini við sær suður aftur.

### Vóru uppsettar

Tað gjørdist tó rættiliga skjótt greitt, at uppgávan hjá VB fór at verða alt annað enn løtt leygardagin. Kyndil hevði so avgjørt tikið við læru av avrikinum móti Tjaldri, og frá fyrsta bríkslið var sjónligt, at leikararnir vóru sera uppsettar til dystin.

VB fekk tó betru byrjanina, men í mun til fleiri aðrar dystir hjá Kyndli, so tóktist hetta so avgjørt ikki at nerva tær á nakran hátt. Ikki minst mundi tað kennast hugaligt hjá heimaliðnum at staðfesta, at Ann Hansen nú aftur prógvaði, hví hon eigur at teljast millum lyklaleikararnar á liðnum. Eisini hóast hon hevði tørv á eitt sindur av hvíld, og tí eisini nýtti nakrar løtu á beinkinum.

Hjá VB var tað serliga Andrea Lütz, sum gjørdi um seg fyrstu løtuna, og tað fyrst og fremst henni at takka, at VB fekk togað seg nøkur mál fram um gestirnar. Eftir 15 minuttum hevði Kyndil tó sæð nóg mikið av hesum, og so varð farið út í mansverju. Hetta var so avgjørt ikki nakað, sum hóvaði VB serliga væl. Ikki minst tí Fríða Petersen í málinum tóktist at hava ein góðan dyst, og millum annað hevði sera gott tak á Reginu Radó, sum fleiri ferðir slapp ígjøgnum, nú spælt varð fimm móti fimm. Ístaðin eydnaðist Kyndli spakuliga at toga seg inn á VB liðið.

Seinastu tíggju minutt-irnar undan steðginum kom fór tó at gangast heldur striltið hjá Kyndli. Kanska hevði tað kostað ov nógv at stríðast seg inn á VB, og vóru kreftirnar tískil ikki til staðar at fara fram um gestirnar. Hinvegin hevði heimaliðið framvegis væl fatur í verjupartinum, soleiðis at VB heldur ikki megnaði at fara tað stóra frá vertunum hesa løtuna.

### Málveitsla

Hóast málini vóru hampuliga nógv í fyrra hálvleiki, so var hetta tó lítið, í mun til tað, sum var í væntu seinna umfarið.

VB leyp beinanvegin avstað, og eftir fáum minuttum høvdu tær toygt leiðsluna somikið, at líkt var til, at dysturin nú var avgjørdur. Ikki minst var tað væl virkandi kontraspælið, sum var orsøkin til hetta, og tað var fleiri ferðir, at bæði tvær og tríggjar av gestunum vóru einsamallar framman fyri málið hjá Kyndli.

Hetta tók eisini líka sum luftina úr kyndilskvinnunum, tí meðan tær máttu stríðast fyri at kalla hvørt mál, kundi VB í fleiri førum standa seg við at blaka einstakar leikarar fram í mótálop, meðan hinar fingu sær enia lítla hvíld.

Seianstu løtuna ásannaðu bæði liðini, at dysturin var avgjørdur, og tí tóktist hvørgin parturin at leggja so nógv fyri, í royndunum at steðga mótstøðuni. Hinvegin var álopshugurin framvegis stórur, og málini fóru nú at skola inn í báðum endum. Tá avtornaði, vóru ikki færri enn 70 mál skotin, og hetta er eisini met fyri kappinginarárið í ár. Í roynd og veru kundi talið verið væl hægri, tí umframt øll málini, sum skotin vóru, misnýttu liðini bæði eisini hópin av málmøguleikum, umframt at málverjarnir – so løgið tað ljóðar – als ikki høvdu nakran vánaligan dyst.

### Skaðaplágaðar

Við sigrinum syrgdu tær úr Vági fyri, at tær framhaldandi hanga fast í oddinum, har tað fyrst og fremst eru klaksvíksgenturnar, sum tær skulu stríðast við í dystinum um silvurið.

Møguleikin fyri gullmerkjum lúrir tó framvegis, og nú VÍF hevur mist ein av stuðulsleikarunum, eru hini liðini kanska farin at lukta blóð í oddastríðnum. VB er tó ikki á nakran hátt sloppin undan fyribrigdinum við skaðum. Triðja í røðini av VB-kvinnum við brotnum limum, er Leila Jespersen, sum annars hevði fingið ein týðandi leiklut í fráveruni hjá Sólrun Krossla og Rannvá Augustinussen. Meðan hesar báðar hava brotið armin, er Leila nú úti við brotnum fóti, so spurningurin er helst, um VB áhaldandi megnar at vinna á mongu skaðunum, sum skerja liðið.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 9(6), Jórun Ludvig 7, Ann Hansen 6(2), Anita Kjærbo 5, Erla Smith 2, Jensia Petersen 1
VB: Andrea Lütz 11(3), Christina Holm 9, Gurið Mortensen 6, Regina Radó 6, Margreth Augustinussen 3, Eyðbirtt Krosslá 3, Mary Krosslá 2
Brotskøst: Kyndil 9, VB 4
Útvísingar: VB 3
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Ein friðarlig uppgáva, sum varð loyst uttan stórvegis hóvasták.

gult cyan magenta svart



# Steypakapping hjá yngru liðunum

**Alt hetta vikuskiftið leiktu yngru liðini finaluumfarið í steypakappingini. Dysatast varð í Havn, har báðar hallirnar vórðu nýttar til endamálið, og hóast nakrar seinkingar vóru, var tiltakið sum heild sera væl eydnað.**

Niðanfyri prentað vit myndir av vinnarunum í ymsu deildunum.

Gentur 10 ár vann StÍF

Dreingirnir hjá VÍF vunnu bólkin hjá teimum 10 ára gomlu

Vinnarar í gentum 12 varð StÍF

Kyndil vann kappingina fyri dreingir 12

Neistin vann kappingina hjá 14 ára gomlu gentunum

Vinnarar, dreingir 14. Kyndil

Neistagentur vunnu eisini í gentum 16

Vinnarar í dreingir 16 gjørdist Neistin



*Gentur 10 ár*



*Gentur 12 ár*



*Gentur 14 ár*



*Gentur 16 ár*





*Dreingir 10 ár*



*Dreingir 12 ár*



*Glaðir vestmenningar eftir sigur*



*Dreingir 14 ár*



*Mynd: Álvur Haraldsenx*

*Dreingir 16 ár*